Oddafiskar í KT-vinnuni:

# – Tað almenna má ganga á odda



*Edvard Remberg, Formula*



*Tummas Nielsen, Elektron*



*Christian Nagatha, Com Data og ReproZ*



*Bjarni Bjarnason, Kall*

**Við setnarrøðu síni sipaði løgmaður til, at KT-vinnan enn ikki hevur víst nøkur munandi búskaparlig úrslit – hvørki fyri einstøku virkini ella í útflutningshøpi – um samanborið verður við fiskivinnuna. Sosialurin hevur spurt nakrar oddafiskar í KT-vinnuni, um hvat teir halda um útsøgnina hjá løgmanni:**

KT2006
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

**Edvard Remberg, Formula**
Eg kann ikki verða ósamdur við løgmanni. Eg haldi, eins og hann, at KT-vinnan skal verða ein týðandi partur av føroysku vinnuni. Formula hevur seinastu árini miðvíst arbeitt við at vaksa um marknaðin uttanlands, og hevur hetta eyðnast á summum økjum. Men tað, sum er vert at leggja til merkis er, at hetta fyrst og fremst eru loysnir, sum hava sín uppruna á heimamarknaðinum. Teir karmarnir, sum føroyska KT-vinnan fyrst og fremst hevur at arbeiða í, eru í ein stóran mun á heimamarknaðurin. Tí er tað gott at hoyra løgmann siga, at tað almenna skal verða við til at menna KT-vinnuna. Men júst hetta hoyrdu vit tó eisini á KT2002 og KT2004, og tíverri ber tað til at staðfesta, at tað í ein ávísan mun lekur millum teori og praksis. Eitt nú vórðu tvær tær seinastu stóru KT-verkætlaninar seldar til útlendskar veitarar. Hetta átti heldur at verið eitt eyðsæð høvi til at menna føroysku KT-vinnuna enn meira - soleiðis, at hon kann gerast ein grundarsteinur í framtíðini hjá føroyingum.

**Tummas Nielsen, Elektron**
Tað er rætt, at KT-vinnan enn ikki er vorðin eitt veruligt alternativ til fiskivinnuna. Høvuðsorsøkin er, at vit mangla útbúgvin fólk innan øki. Vit kundu møguliga fingið nakrar KT-serfrøðingar uttanlands frá at arbeitt og givið føroyingum íblástur. Men føroyska samfelagið er so afturlatið, og tískil er tað sera trupult at fáa útlendingar til landið. Men tó haldi eg ikki, at KT-vinnan er so lítil, sum flest øll halda. Men eingi hagtøl eru til taks, so trupult er at siga, hvussu stóran týdning, hon veruliga hevur. Annars átti tað almenna at sett størri íløgur í føroysku KT-vinnuna í staðin fyri uttanlands. Í løtuni finna fleiri og fleiri KT-fyritøkur annars saman, og hetta er avgjørt ein fyrimunur, ið styrkir KT-vinnuna munandi. Vit áttu at arbeitt meira saman, tí so høvdu vit komið langt.

**Christian Nagatha, Com Data og ReproZ:**
Eg eri samdur í, at KT-vinnan ikki er vorðin tann vinnan, vit av fyrstan tíð ynsktu, hon fór at verða. Men í høvuðsheitum liggur trupulleikin hjá tí almenna, ið frá byrjan av ikki stólaði upp á føroysku KT-vinnuna. Eitt nú hava teir júst keypt eina spildurnýggja edv-skipan til føroysku skúlarnar frá íslendingum uttan yvirhøvur at spyrja føroysku KT-vinnuna. Um tað almenna ætlar at stevna ímóti, at KT-vinnan skal verða eitt berandi bein í Føroyum, noyðist tað almenna at bjóða uppgávur út til føroysku KT-vinnuna. Tástani mennist føroyska vinnan og er før fyri at kappast uttanlands. Men tá tað almenna heldur koyrir uppgávur út um landoddarnar, mennast feløg og starvsfólk uttanlands í staðin fyri í Føroyum.
Fyri nøkrum árum síðan setti Íslands sær til endamáls at satsa upp á KT-vinnuna. Eitt nú settu íslendingar eina KT-lærugrein á stovn. Í dag er KT-vinnan ein stór vinna í Íslandi og veksur alsamt. So fyrsta fortreytin fyri, at vit kunnu kappast á jøvum føti við stóru fyritøkurnar uttanlands, og at KT-vinnan í føroyum verður eitt bein at standa á, er, at tað almenna gongur á odda.

**Bjarni Bjarnason, Kall:**
Tað er púra rætt, sum løgmaður sigur. Men trupulleikin er, at vit føroyingar duga ikki at føra okkum fram á altjóða marknaðinum. Høvdu vit veruliga ynskt at havt eina aðra høvuðsvinnu, áttu vit langt síðan at hava fingið hana. Eitt nú hava vit havt tveir gyltar møguleikar í byggivinnuni og farmaflutningsvinnuni – vit kundu eitt nú havt gjørt eitt føroyskt NCC. Men vit eru ov smæðin, tá tað kemur til stykkis. Tað er tann generelli hugburðurin, tað er galið við. Um onkur fær eitt hugskot, so verður hann sum oftast at kalla bara slættaður niður í jørðina. So ein møgulig loysn á trupulleikan er kanska at avtaka jantulógina. Somuleiðis tosa vit ofta eitt nú um, at vit mangla útbúgving fólk til KT-vinnuna. Hetta hava vit roynt, men tað er alt ov torført at innflyta fólk til Føroya, so tað loysir seg avgjørt ikki.

## Annika Andreassen, fyrireikari av KT2006, Synergi



*Hvat heldur tú sum heild um KT2006?*
– Stevnan er spennandi fyri bæði luttakararnar og vitjandi. Eg haldi, vit hava givið luttakarunum góðar umstøður, og vóni, teir hava fingið nógv burturúr. Tað er gott, at KT-vinnan kemur saman á stevnu. Hetta gevur høvi til innanhýsis samstarv, eins væl og fyritøkurnar finna nýggj viðskiftafólk. Básarnir í ár eru serstakliga góðir og ymiskir. Tað er ein fragd fyri eygað at síggja, hvussu nógv er gjørt burturúr.

*Ert tú nøgd við undirtøkuna?*
– Ja, eg eri væl nøgd. Sjálvandi hevði eg ynskt, at fleiri fólk vóru at síggja á stevnuni, men nógv hava melda seg til og væntandi koma fleiri seinni.

## Hallur Poulsen, LM-Electric

*Hvat heldur tú sum heild um KT2006?*
– Mær dámar væl stevnuna. Hon er spennandi og lærurík. Her fáa vit veruliga víst kundum okkara tænastur og vørur. Serliga dámar mær væl, at básarnir ikki eru so óruddiligir. Øll hava gott pláss, og alt kemur til sín rætt. Somuleiðis er tað gott, at ikki bara ein og hvør kemur inn, men heldur tey, ið veruliga eru áhugað í KT. Men eg hevði tó ynskt, at her vóru fleiri vitjandi. Alt ov fá hava verið og vitjað stevnuna. Um tað er ov dýrt at sleppa inn ella tíðin ikki er tann rætta, veit eg ikki.



*Hvat fáa tit burtur úr stevnuni?*
Nógv aftursvar frá vitjandi. Gott er at fáa høvi til at práta við tey vitjandi, og vónandi fara vit at fáa nakrar nýggjar kundar. Men longu hava vit hála nógvar kundar í land og hava fingið samband við fleiri, ið vilja samstarva við okkum eftir stevnuna. So alt í alt ein góð stevna.

## Eli Christiansen, umsitingarleiðari á Fiskiransóknarstovuni



*Hvat heldur tú sum heild um KT2006?*
KT-stevnan er eitt fínt átak. Í tí dagliga verður samskift við veitararnar, men hetta er eitt sindur serligt, tí tú fært eina fatan av, hvat rørir seg á marknaðinum av nýggjum, umframt at tú gevur tær tíð at hitta fólk í vinnuni, lurta eftir áhugaverdum fyrilestrum o.s.fr.

*Hvat hevur tú fingið burturúr?*
Vitan um nýggjar vørur, góðar fyrilestrar, góð prát o.s.fr. Eg havi ikki verið so leingi á stevnuni, men møguliga komi eg aftur seinni á degnum.

*Hvat var serliga gott og hvat átti at verið betri?*
Onkur fyrilestur var góður og nakrar vørur góðar, men á ein ella annan hátt sakni eg meira nýskapan, sum knýtir seg til tørvin hjá virkjum og einstaklingum.